Spurningar og svar til útboð eftir

Outsystems mennarum til Barsilsgrunnin

Tórshavn, 13-09-2023

1. *Kann bjóðast sjálvt um tað lítið felag, við nógvum royndum, ið metast virðismiklar. Men eingin mennari er certifiseraður í Outsystems?*

   Svar
   Øll tilboð eru vælkomin, tó vil ein veikari virkisbygnaður trekkja niður í metingini. Vísast skal eisini á, at mennari ein bjóðar framm er í holt við ella fer at taka certifisering innan Outsystems.

2. *Er bert talan um teir nevndu 1000 tímarnar árliga?*

   Svar
   teir 1000 tímarnir eru teir TAKS í minstalagið kann lova innan avtaluna. Men talan verður um eitt menningartoymið har tveir Outsystems mennarar væntandi eru fulltíðar tilknýttir.

3. *Er nakar minstiprísur?*

   Svar
   Minstiprísur verður settur til kr. 500,-/tíman u/mvg, fyri at sleppa undan beinleiðis prísdumping

4. *Er tað rætt at ein mennari bert kann vera mitt í sundurgreinaðu prísunum um hann hevur eina útbúgving frá hægri lestri?*

   Vit strika “hægri lestur” úr týdninginum fyri miðal-prísin “Outsystems-mennari”. So tað er sum niðanfyri.

Leiklutur	Týdningur
Senior Outsystems-mennari	Systemmennari við minst 3 ára royndum við menning á Outsystems-platforminum. Certifiseraður í Outsystems.
Outsystems-mennari	Mennari við KT-útbúgving og minst 3 ára royndum við menning í øðrum teknologium t.d. #C Certifiseraður í Outsystems.
Junior Outsystems-mennari	Mennari við ongari ella stuttari KT-útbúgving og undir 3 ára royndum við menning. Certifiseraður í Outsystems.